

## Heimsins ríkasti

Meksikanski telefyritøku matadorurin, Carlos Slim Helu, er nú ríkasti maður í heiminum. Seinastu 12 mánaðirnar hevur 70 ára gamli meksikanarin økt um sítt ríkidømi við 18,5 milliardum dollarum. Við sínum 53,5 milliardum dollarum á kontoini er hann harvið heimsins ríkasti maður anno 2010. Microsoft-milliarderurin, Bill Gates, ið var heimsins ríkasti frá 1995 til 2008, er fluttur av triðja plássi upp á eitt annað pláss í ár. Toppin av kransakøkuni tekur Carlos Slim Helu frá amerikanska handilsmanninum Warren Buffet, hvørs tap hála hann niður á triðja plássið. Eisini danir teljast millum milliarderarnar, og á ársins lista eru tveir danir. Ríkasti maður í Danmark er Lego-milliarderurin, Kjeld Kirk Kristiansen, sum kann reypa av 3,5 milliardum dollarum, sum gevur honum eitt 258.-pláss á listanum, og nummar 655 á listanum hjá Forbes er Coloplast arvingin, Niels Peter Louis-Hansen, við einum virði á 1,6 milliardir dollarar, skrivar Politiken.

# olarum er órógvandi



*"... allir myndugleikar vita í dag, at einki er í lógini, sum forðar okkum í at partrola, so her er einki at koma eftir..."*
*(Hans Joensen, reiðari)*



*- Her er einki at koma eftir. Vit gera bara tað, sum loyvi gevur okkum heimild til, sigur Hans Joensen, reiðari á Beinissvørði*

*"... eg haldi, at politiska skipanin í stundini átti at gjørt nakað við hetta mál, soleiðis at vit ikki seinni standa sum ryssa yvir deyðum fyli..."*
*(Fiskimaður)*

við sær, leggur fiskimaðurin aftrat.

### Ein rættur

Í samrøðu við Dimmalætting herfyri, segði reiðarin á Beinissvørði, Hans Joensen, vanliga róptur Hans í Líðini, at royndin, sum skipini nú gera, er ein rættur, sum teir hava havt í fimtan ár.

- Allir myndugleikar vita í dag, at einki er í lógini, sum forðar okkum í at partrola, so her er einki at koma eftir, sigur reiðarin.

Hans Joensen vísir á, at stóru trolarunum nýtist ikki serligt loyvi úr Fiskimálaráðnum fyri at partrola, tí hetta er ein rættur, sum skipini hava sambært galdandi loyvum.

Í samrøðu við Dimmalætting sigur Hans Joensen, at lemmatrolararnir ynskja at koma upp í fiskidagaskipanina.

- Men soleiðis, sum lógin er sett saman, er einki sum forðar okkum í at fiska hvønn tann einasta dag á árinum, sigur reiðarin, sum kortini ásannar, at hetta ikki kann ganga í longdini.

Hans Joensen vísir í samrøðuni á, at um allir trettan lemmatrolararnir koma á innaru leið at royna, er talan um 4750 dagar afturat, sum verða brúktir at fiska upsa.

- Tað fer sjálvandi ikki at bera til, sigur reiðarin á Beinissvørði, Hans Joensen.

## Tvingsilssøla

20. apríl 2010 kl. 10.45, verður á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøtu 1, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir ognina matr. nr. 749, liggjandi Bøherðan 17, Skopun (AS nr. 2-9/ 2010).

Talan er um eini hús frá 1930'unum í trimum hæddum, umframt eitt úthús. Grundin er stoypt og tvær hæddir eru klæddar við timbri. Takið er úr aluminium. Bygdaøkið er 33 $m^2$ og grundøkið er uml. 300$m^2$.

Húsini eru nærri innrættaði soleiðis:

**Miðhædd:** Durur/gongd, baðirúm við brúsu, stova og køkur.

**Loft:** Trappupallur, wc, hjúnarúm og 2 kømur.

**Kjallari:** Óinnrættaður.

Húsini hava fingið gjørdar dagføringar í 2006 og 2007, so sum tak, klæðning, køk og baðirúm, umframt hvítvørur. Húsini eru í rímiligum standi, men treingja til ymiskar ábøtur.

Tvingsilssølan er umbiðin av Inga Højgaard, adv., Yviri við Strond 4, Tórshavn, tlf. 311260 (sak nr. 50950-01), sum kann geva nærri upplýsingar um ognina.

Tvingsilssøluuppgerð kann umbiðjast hjá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á Dómaraskrivstovuni.

*Føroya Fútarættur, tann 10/3-2010*